## Bankapakki skerjir trygd

Danska stjórnin kom við enn einum bankapakka í gjár, sum kemur í gildi tann 1. oktober. Hetta er tann triði í røðini, og høvuðsinnihaldið í honum er, at fólk fáa trygd fyri pengum, sum tey hava í bankunum, men tó í mesta lagi 750.000 krónur. Tað er eitt afturstig, skriva danskir fjølmiðlar og vísa á, at undan hesum pakkanum var trygdin óavmarkað. Tað, sum kann gleða donsku skattgjaldararnar er, at sambært tí nýggja pakkanum sleppa teir fá at gjalda, um ein peningatsovnur fer av knóranum eftir tann 1. oktober. Tá skal fíggjarheimurin sjálvur gjalda.

## Mugu avskriva nógv

Íslendska fiskivinnan er so illa fyri fíggjarliga, at skal raksturin klára at fíggjua skuldina, er neyðugt at avskriva umleið 20 prosent av øllum verandi skuldbindingum hjá vinnuni. Tað svarar til umleið 100 milliardir íslendskar krónur. Friðrik J. Arngrímsson, sum er stjóri í íslendska reiðarafelagnum, sigur við fjølmiðlarnar, at fleiri fyritøkur í vinnuni klára ikki sínar skyldur. Summar fáa kanska avtalu við sínar ognarar um at skarva av skuldini, og í øðrum førum verða fyritøkurnar kanska seldar, sigur hann.



# Hugnar sær við Ljósá

**Roysningurin, sum fyri nøkrum vikum síðan helt til í Norðoyggjum, heldur nú til í Sundalagnum**

DJÓR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Í 16 dagar visti eingin, hvar roysningurin, sum fyri vikum síðan kom inn á Árnafjørð, var blivin av. Um hann var farin av landinum ella var her onkrastaðni.

Men hósdagin kom hann upp á land við Ljósá, og tað eydnaðist fólki á Náttúrugripsavninum at seta nýggjan sendara á hann.

Sendari varð settur á roysningin, tá ið hann uppi á landi í Árnafirði, men fáar dagar seinni tagnaði sendarin.

Tað er eingin ivi um, at hetta er sami roysningur, tí gamli sendarin var á honum enn.

Nýggi sendarin varð settur á roysningin hægri uppi, so hann ikki so lætt kann leggja seg á hann, tá ið hann rullar runt á sandinum.

Grønlands Naturinstitut við heimstaði í Danmark fíggjar verkætlanina við sendaranum, sum ætlanin er skal siga søguna um, hvussu roysningurin ferðast. Heldur sendarin leingi, kann kanska eisini fáast at vita, hvaðni roysningurin er komin.

Í morgun lá roysningurin framvegis á sandinum niðan fyri norðastu húsini við Ljósá.



*Roysningurin tykist hava tað gott, har hann liggur á sandinum og svevur*
*Mynd: Borgarhjørt Skálagarð*

## Vinnan sleppur frá vatngjaldi

**Klaksvíkar býráð hevur slept ætlanini um at áleggja vinnuni at gjalda fyri vatn**

Klaksvíkar býráð ætlaði at fáa 300.000 krónur inn um árið við at áleggja vinnuni at gjalda fyri nýtsluna av vatni.

Men á fundi týskvøldið samtykti býráðið at sleppa hesi ætlan.

Tað er ikki tí, at vinnuvirkini hava mótmælt, men býráðið hevur við at seta fyrimunir upp móti vansum valt at sleppa hesum inntøkumøguleika.

Býráðið heldur, at nú partar av vinnulívinum eru í fíggjarligari trongdstøðu, er hetta ikki rætta løtan at áleggja vinnuni slíkt gjald. Haraftrat gevur tað umsitingini hjá kommununi eyka arbeiði við at skráseta og krevja inn gjaldið.

Nú kommunan ikki fær hasa inntøkuna, verður neyðugt at spara aðrastaðni.

**randi**



*Raja fruktar væl og svartaspilla ger hesum eplinum einki*

# Raja-eplini hvørva

**Lítli eftirspurningurin í øðrum londum eftir eplum av slagnum Raja helst bara verða at fáa í ár aftrat**

VELTING
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Seinastu árini hevur lutfalsliga nýggja eplaslagið Raja verið nógv brúkt í Føroyum, fyrst og fremst tí svartaspilla ikki bítur á tí, og so smakkar tað eisini væl.

Men nú noyðast tey, sum velta epli og sum hava sett Raja niður, skjótt at leita sær eftir onkrum øðrum eplaslagi.

Hetta er helst seinasta árið, at Raja fæst, sigur Peder T. Haahr, leiðari á Royndarstøðini í Kollafirði.

Hann hevur sent sær til donsku fyritøkuna, sum selur hetta eplaslagið og fingið at vita, at tey selja bara Raja til Føroya og selja bara umleið 500 kilo í Danmark. Eitt sløð fyri til Hollands, haðani hetta eplaslagið stavar.

– Hetta er keðilig tíðindi fyri Føroyar, tí Raja er eitt av okkara bestu eplum, og tí eru eini ráð at seta nakað av Raja niður í ár og taka nakað av til set, sigur Peder T. Haahr.

Hann minnir annars á, at tá ið set verður løgd, eru eini góð at putra tey móti soppi. Tað er eitt pulvur, ið fæst í teimum handlum, sum elja seteplir.